**Synack um seg sjálvan: VISIÓN OKKARA** Eitt høgt tænastustøði sum nøktar tørvin hjá kundanum er grundarlagið og orsøkin til, at Synack bleiv stovnað. Av somu orsøk stremba vit altíð eftir, at varðveita eitt høgt tænastustøði við at hava eitt gott samskifti við okkara kundar. Vit ynskja at bjóða okkara starvsfólkum eitt spennandi og mennandi arbeiðsumhvørvi, sum kann vera við til at tryggja okkara missión um, at verða teir bestu á marknaðinum bæði innanfyri vitan og prís. At verða best krevur, at vit altíð klára at veita góðar loysnir til okkara kundar, sum okkara starvsfólk og Synack sum virkið, kunnu standa inni fyri.

# ALT BYRJAÐI NORÐAN FJALL

26 ára gamli Ragnar Sigurðsson Joensen er vaksin upp í Hvannasundi, og norðan Fjall fekk kt-fyritøkan Synack sínar fyrstu kundar. Í dag eru teir tríggir, sum nú breiða fyritøkuna kring landið.

*Tekstur: Øssur Winthereig – PRESS*
*Mynd: Kári við Rættará*

Dreymurin um sítt egna – dreymurin sjálvir at seta okkurt í gongd. Tað er spenningurin at sleppa at liva tann dreymin, sum er drívmegin – áðrenn stóra lønin sæst aftur á bankabókini.
Ragnar Sigurðsson Joensen, Svend Ingi Krosstein og Heðin Ejdesgaard Møller hava seinastu árini arbeitt seg inn á føroyska kt-marknaðin við kt-fyritøkuni Synack.

– KT-marknaðurin er ein lítil marknaður, men enn sær út, sum pláss eisini er fyri okkum, sigur Svend Ingi Krosstein.
Svend Ingi er 31 ára gamal og næstan liðugur sum grannskoðari. Hann er nýggjur í fyritøkuni. Sum í flestu nýggjum fyritøkum, so sóu slóðbrótararnir Ragnar og Heðin skjótt, at sera trupult var at halda eina fyritøku koyrandi uttan at hava ein at taka sær av bókhaldinum.

– Ja, enn er hetta eitt lestrarstarv hjá mær, men nógv meiri spennandi arbeiði ivist eg í, um eg kundi fingið, sigur Svend Ingi Krosstein. Áðrenn hann verður grannskoðari, skal hann skriva seinastu uppgávuna og arbeiða nøkur ár.

## Førleikin mentist norðan Fjall

Ragnar Sigurðsson, 26 ár, hevur sum vaksin arbeitt í størri kt-fyrtøkum, men hansara kt-áhugi og førleiki mentist í Hvannasundi, tá hann var barn har.
– Ja, summi kalla Hvannasund okkara SiliconValley, nevnir Ragnar og minnir á kt-fyrtøkuna Knassar, sum eisini er ment norðan Fjall.

Sum 13 ára gamal var Ragnar Sigurðsson Joensen við til at stovna breiðband umvegis fylgisvein til fyritøkur og fólk í Hvannasundi.
- Føroya Tele rakk ikki til Hvannasunds, so vit settu okkara egna breiðband á stovn í 2003, og ikki fyrr enn í 2007 kom breiðbandið frá Føroya Tele til bygdina, sigur Ragnar. Longu tá vóru onkrar fyritøkur norðan Fjall, sum høvdu tørv á einum skjótum og støðugum internetsambandi.

## Servitan um servarar

Við royndunum úr Hvannasundi tóku Ragnar Sigurðs-son Joensen og Heðin Ejdesgaard Møller seg saman i nýstovnaðu kt-fyritøkuna Synack. Servitanin er inn servara- og netumsiting hjá øllum sløgum av fyritøkum.
– Vit seta servarar og net upp, ráðgeva og bjóða okkum fram at fylgja við alt samdøgnið, hvussu netið koyrir og umvæla feilir, so skjótt teir koma, sigur Ragnar.

Í summum førum eru teir við frá fyrsta degi, men tað mest vanliga er, at smáar fyritøkur keypa net og

fara í gongd, men so seinni hava brúk fyri føstum netumsitarum.

– Ofta er tað ein beiggi ella eitt systkinabarn, sum onkur í eini fyritøku kennir, ið hevur netið um hendur í fyrstani. Tað riggar eisini væl hjá teimum flestu, men sum frálíður skulu broytingar gerast og meiri støðugt viðlíkahald krevst. Har er tað, at vit koma inn, sigur Ragnar.

Royndirnar vísa, at kt-krøvini til flestu fyritøkur vaksa skjótt, og hetta ger, at eftir trimum fýra árum skal netparturin endurskoðast og ofta skiftast út.
- Tað vísir seg vanliga, at tað er dýrt at koma afturumaftur, men í smáum fyritøkum er tað ofta soleiðis.

## Fáar standardloysnir

Sjálvt um nógvar í Føroyum minna um hvørja aðra, vísir tað seg, at trupult er at gera standard-loysnir.
- Vit hava onkrar serligar bransjur í huganum, sum kundu brúkt somu servara- og netskipanir. Tað hevði gjørt tað bíligari fyri fyritøkurnar, og arbeiðið kundi verið gjørt í Føroyum, sigur Ragnar. Teir hava arbeitt fyri onkrar kommunur, og har eru møguleikar at gera meiri standard-kendar loysnir.

Eyðkennið fyri kt-bransjuna í dag er, at ein stórur partur av arbeiðinum kann gerast frá telduni, har tú situr. Tær nýtist ikki at standa boygdur yvir ein káplafrumskóg í einum lítlum og heitum servararúmi.

## Kappingin er hørð

- Okkum nýtist ikki at fara út fyri at rætta feilir. So at siga alt tekniskt viðlíkahald og flestu umvælingar kunnu gerast frá okkara egnu teldum og krevur tí ikki, at vit dagliga møta upp í fyritøkuni. Men vit vilja sjálvandi eisini heilsa upp á tey, sum vit arbeiða fyri, sigur Ragnar.

Fremsta vøran hjá Synack er júst avtalur við fyritøkur um viðlíkahald og umvælingar alt samdøgrið.

Kappingin á KT-marknaðin er hørð og kemur eisini uttanifrá, júst tí arbeiðið næstan bara krevur eina teldu, umframt ta servitan, sum medarbeiðararnir hava. Synack hevur skrivstovu á Eiði, har Heðin Ejdesgaard Møller býr. Svend Ingi arbeiðir úr Havn, og Ragnar sjálvur arbeiðir oftani úr USA, har hann hevur maka.
– Í USA eru vit sjey tímar aftanfyri, so tað er bara til fyrimuns fyri okkara kundar, at vit kunnu arbeiða allar 24 tímar í samdøgrinum, heldur Ragnar.



## Samstarv úteftir

Umframt í Synack arbeiða teir neyvt saman við fleiri útlendskum fyritøkum. Sjálvur hevur Ragnar í meiri enn eitt ár arbeitt hjá Black Lotus Communication í Los Angeles. Hendan fyrtøkan arbeiðir við trygd móti internetálopum, og Synack er teirra samstarvsfelagi í Evropa.

– Vit umsita eisini trygdarskipanir, har vit hjálpa fyritøkum við servaratrygd – bæði innanveggja og við teimum hóttanum, sum liggja og lúra uttanfyri.
Tá prátið fellur á netumsiting og kundarøkt, duga hesir ungu menninir avbera væl:

– Vit leggja okkum eftir at gera alt ordiligt fyrstu ferð og gera tað rætt. Vit leggja okkum eftir at svara kundanum skjótt. Prátið gongur skjótt í einum so lítlum landi. Tann parturin skal vera í lagi frá fyrsta degi, siga teir um kundarøktina.

Nakað varligari eru teir báðir, tá prátið fellur á fíggjarliga partin í fyritøkuni. So eg tveitti avgerandi spurningin í høvdið á Svend Inga, sum næstan er grannskoðari og Ragnari, ið hevur lært seg netumsing og KT norðan Fjall:
– Tjena tit nakrar pengar?

Eitt sindur varliga hugdu teir hvør upp á annan.
– Umsetningurin er tvífaldaður í ár samanborið við í fjør, eru orðini frá Svend Inga.

Men hann er eisini errin av, at fyritøkan ikki hevur skuld.
– Vit hava keypt og fíggjað alt sjálvir - higartil, sigur Svend Ingi.

## Íverksetarar

Báðir kenna teir seg um íverksetarar og hava eisini rent seg í onkrar av teimum trupulleikum, sum altíð eru, tá ein fyritøka fyrstu ferð bjóðar seg fram.
– Tá fyrstu sáttmálarnir skuldu gerast við aðrar fyritøkur um netumsiting, vóru vit óvanir við tað. Tá høvdu vit heldur ikki ráð og hug at gjalda ov nógv til ein sakførara. Har kundi verið gott við okkurt slagi av ráðgeving, heldur Svend Ingi, og Ragnar vísir nakað av sínum íverksetara bjartskygni:
– Tað ber altíð til í Føroyum at finna fólk, sum vita og kunnu geva ráð, sigur Ragnar.

Millum kundarnar hjá Synack eru Black Lotus, USA, Sikada, Danmark, SEV, H-dygd P/F, Almennaverkið, Bakkafrost P/F, Viðareiðis Kommuna, Tekniski Skúlin í Tórshavn, Føroya Lívstrygging og Norðsetur P/F.